Paul Nicolopulo frá bretsku sendistovuni í Keypmannahavn:

Fyrsta floks oljuráðstevna

Paul Nicolopulo, frá bretsku sendistovuni í Danmark var við á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum

Hosdagin varð miniráðstevna fyri næmingum frá miðnámsskúlunum kring landið

Hetta er fyrstu ferð Poul Nicolopulo vitjar í Føroyum og heldur hann fyri, at Norðurlandahúsið er eitt framúrskarandi bygningur, sum mangir býir, ið eru nógv størri enn Havnin, munnu øvunda føroyingum.

Hann er eisini hugtikin av tí fjølbroytta veðrinum.

Tað er ringt at finna orð fyri tí. At tað sama dag skal vera sólskin, regn, kavi er nakað tú ongantíð gloymir.

Paul Nicolopulo sigur annars, at tað, sum hevði hansara stóra áhuga á ráðstevnuni var spurningurin um eftirlit við umhvørvinum.

-Ein av føroyingunum eg tosaði við segði, at ein síðuvinningur av kanningunum í sambandi við eina oljuvinnu, kann gerast, at føroyingar fara at fáa størri kunnleika til fiskastovnarnar og umhvørvi annars.

Hann heldur annars, at føroyingar - út frá fyrilestrunum - tykjast fyrireikaðir til at møta hesi nýggju avbjóðing - soleiðis at vinnulívið á oyggjunum verður ført fyri at láta útlendsku oljufeløgunum bæði vørur og tænastur.

JAN MØLLER

-Hetta hevur verið ein fyrsta floks ráðstevna. Eg eri sera hugtikin av, hvussu væl føroysku fyrilestrarhaldarnir kláraðu seg. Ikki minst tá tú hugsar um, at alt var á einum fremmandum máli, enskum.

Føroyski parturin av ráðstevnuni var sera professionellur, tá hugsað verður um, hvussu lítið samfelag talan er um, og eg haldi, at útlendsku oljufólkini, sum vóru komin til ráðstevnuna, fara avstað aftur við eini sera positivari kenslu um fólkið og samfelagið her.

Hetta sigur Poul Nicolopulo, sum var ein av útlendsku áhoyrarunum á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum nú um dagarnar. Hann starvast sum fyrsti skrivari á bretsku sendistovuni í Danmark.

Paul Nicolopulo hevur fingið nógv at vita á ráðstevnuni, sum hann ikki visti áður og út frá fyrilestrunum at døma heldur hann, at tað fara ikki at ganga nógv ár, til tann fyrsti boripallurin er í føroyskum sjógvi.

Serframsýning á Fornminnissavninum

Í gjár læt upp íslendska ferðaframsýningin Ísland í 1200 ár í hølunum hjá fornminnissavninum í Brekkutúni 4 í Hoyvík.

Tað er fornminnissavnið í Hafnarfirði sum hevur gjørt framsýningina, og higartil hevur hon vitjað í Finnlandi, Álandi og í Danmark.

Framsýningin gevur eitt stutt yvirlit yvir søgu íslendinga í 1200 ár, frá tí at Ísland varð funnið av norðbúgvum í 874 e.Kr. og fram til dagin í dag, við serligum denti á søgu Hafnarfjarðar. Søgan verður lýst við lutum, myndum, tekstum og sjónbandaupptøkum.

Framsýningin stendur uppi fram til 13. apríl. Í hesum tíðarskeiði er framsýningin hjá Føroya Fornminnissavni opin mánadag til fríggjadag frá kl. 14 til 17, og leygardag og sunnudag frá kl. 13 til 17. Skúlaflokkar, ið ynskja at síggja framsýningina uttanfyri vanliga upplatingartíð, kunnu venda sær til fornminnissavnið.

Føroya Fornminnissavn hevur nú fingið sína egnu heimasíðu á Internetinum. Her ber til at fáa upplýsingar um framsýningar umframt søgu og virksemi stovnsins, og eisini verður víst til, hvat fornminnissøvn í útlondum hava at bjóða internetbrúkarum.

Heimasíðan hjá Føroya Fornminnissavni er at finna undir adressuni **www.sleipnir.fo/fms.**

Fujitsu *ErgoPro PC*

Veiðan eftir tí fullkomna PC!

Uppgavan: Ger ein PC grundaðan á tann alranýggjasta hátøknibúnaðin. Við hjálparfunktiónum, sum minka um rakstrarútreiðslurnar. Og til ein keypsprís, sum ikki forkemur pengapunginum.

Loysnin: Tann nýggja slóðbrótandi ErgoPro-serian frá Fujitsu! Ein seria, sum ikki bert er fullbúgvin til Desktop Management (DMI), men sum eisini er komin nýtsluklár til verðina, tí at hon er framleiðsluútgjørd við eitt nú Lan millumstykki, CD ROM og ljóðskipan. Og sjálvandi eisini Microsoft Windows virkisskipan.

Tær tekniligu spesifikatiónirnar leggja flest allar aðrar aftur um bak:
Nýtt synkron SDRAM-minni og pipeline burst synkron cache tryggja hægstu nýtslumøguleikar. Eitt synkron SGRAM-grafikkminni við upp til 4 MB gevur ta bestu litsundurloysingina á skíggjanum. Og full duplex ljóðskipan pluss MPEG video-kervi fullfíggja myndina.
Við øðrum orðum: gleð teg til nýggj hópmiðla-upplivilsi, sum liggja fjórbingar frammanfyri tað, tú helt vera gjørligt!

Netsamband? Tín ErgoPro er fødd við 100 Mbps Ethernetibinding, sum eisini klárar títt núverandi 10 Mbps Ethernet. Og hon setir sjálv meira ferð á, um netið verður økt til 100 Mbps.

Plásstrupulleikar? Ikki her! Við Enhanced IDE, Ultra SCSI og upp til 8 GB harðdiskamegni skuldi tú verið væl útgjørdur til komandi avbjóðingar. Og við teimum báðum innbygdu USB (Universal Serial Bus) stikkunum er tín PC meira enn klárur til framtíðarinnar prentarar, skannarar og modem.

Við hesum í huga er tað næstan óneyðugt at nevna, at tín ErgoPro sjálvandi nýtir teir nýggjastu og skjótastu Intel Pentium prosessorarnar við upp til 200 MHz klokkufrekvensi. Men um tú vilt fáa lagt Windows NT Workstation 4.0, Windows 95 ella Windows fyri Workgroups 3.11 inn á tína ErgoPro frammanundan, so er tað fullkomiliga upp til tín.
Undir øllum umstøðum fært tú ein Fujitsu ErgoPro PC, sum kann minka um tínar rakstrarútreiðslur — eisini í longdini.
Lat veiðuna byrja!

intel inside
pentium

Ring til Farodane á telefon **1 14 14** og fá meira at vita um Fujitsu ICL teldurnar, ella vitja okkum á http://www.farodane.fo, ella http://www.fujitsu-computers.com

FUJITSU
PCs • NOTEBOOKS • SERVERS

K4 FARODANE